gult2 cyan2 magenta2 svart2

Nýggjar tíðir og nýggir siðir

Allur blokkpolitikkur og alt flokspolitiskt uppbýti varð burtur, tá formaðurin í Javnaðarflokkinum bjóðaði til 50 ára føðingardag

RUNDUR FØÐINGARDAGUR
Jan Müller

Í bløðunum í londunum kring okkum er hetta so at siga gerandiskostur. Men heima hjá okkum sjálvum er tað meiri ókent, sum formaðurin í Javnaðarflokkinum bjóðaði til hósdagin.

Í lýsing í farnu viku Sosialinum bjóðaði Jónnes Eidesgaard til móttøku í sambandi við, at hann fór um tey fimmti. Og hóast siðurin ikki er gamal í Føroyum, so tóktist tað ikki at bila. Javnaðarformaðurin bjóðaði ábit og okkurt at skola niður við í floksrúminum hjá Javnaðarflokkinum og síðuliggjandi hølum á Gamla apotekinum. Móttøkan var frá klokkan 16 og til klokkan 18, og tað var skjótt, at javnaðarrúmið var fult. So var neyðugt at opna dyrnar til skrivstovur og onnur rúm í grannalagnum, og alt gekk upp á stás.

Sjálvandi skal ikki ov nógv leggjast í, hvør møtir upp, og hvør ikki er til staðar við slík høvi. Tað kunnu vera serliga átroðkandi uppgávur, sum gera, at onkur, sum hevði ætlað sær at vera til staðar, ikki náddi tað kortini. Løgmaður og varaløgmaður mundu vera upptiknir av týðandi politiskum leikum, tí teir vóru ikki at síggja á Gamla apotekinum.

At eingin flokspolitisk ósemja ella ósemja millum andstøðu og samgongu helt fólki aftur frá føðingardegnum vóru tað fleiri dømi um. Millum gestirnar vóru Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður fyri Tjóðveldisflokkin, Finnbogi Ísakson, tingformaður og tjóðveldismaður, Heini Ó Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins, Helena Dam á Neystabø, floksforkvinna í Sjálvstýrisflokkinum, Eyðun Videro, tingmaður fyri Fólkaflokkin og næstformaður í løgtinginum, Lisbeth Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum umframt fleiri onnur tingfólk úr øllum flokkum.

Smílandi hyggur Jóannes Eidesgaard eftir skemtitekningunum hjá Óla P, sum hann fekk í føðingardagsgávu

Mynd: Jens Kristian Vang

Løgtingsformaðurin, Finnbogi Ísakson, var ein av gestunum, ið helt røðu fyri Jóannes Eidesgaard

Umframt eina rúgvu av øðrum gestum vóru sjálvandi umboðini hjá Javnaðarflokkinum í politiska lívinum á Gamla apoteki. Felags fyri øll var, at lagið var av tí besta. Politikarnir høvdu smoygt politiska hamin av sær og hugnaðu sær saman við politiskum viðspælarum og mótstøðumonnum. Akkurát sum tað sømir seg við eitt sovorðið høvi.

Komandi mánadag verða tað trý ár, síðani tað seinast var løgtingsval. Tað vil við øðrum orðum siga, at niðurteljingin til komandi løgtingsval av álvara er byrjað. Í einum valári er so at siga politiskur bruni í hvørjari handling og vending. Ivaleyst hevur onkur fingið politiskt signal at tulka burturúr tí, sum kom fram á apotekinum henda seinnapartin. Viðhvørt var tað stuttligt, so láturin hoyrdist heilt niðan í gomlu amtmansborgina, og viðhvørt var tað bara hugaligt og hugnaligt. Í onkrum føri vóru gjørdar politiska rella persónligar útmeldingar, sum onkur mundi tulka sum fríggjarí undan komandi vali.

At eingin ivi er um, at Javnaðarflokkurin eigur ein sterkan formann, og at eingin ivi er um, hvør verður løgmansevni hjá Javnaðarflokkinum til komandi val, tað var aftur og aftur at hoyra. Umboð fyri onkrar av hinum flokkunum hildu – kanska hálvt í álvara og hálvt í skemti – at teir misunnaðu Javnaðarflokkinum, at teir bara høvdu ein formann, og so royndu teir at billa teimum, ið vóru møtt upp, inn, at í øðrum flokkum eru tað viðhvørt tveir og onkuntíð tríggir formenn!

Minningarorð um
Esmar Lamhauge

Eg kom úr myrkrinum í ljósið
Tá sá eg teg fyrstu ferð
Eymleiki mildur spaklyntur
Mær ognaðist eina av tínum dýru perlum
Hon gav mær kærleika í yvirflóð
Nornan hevur spunnið lagnutráð
Tú eg og øll hini flættast uppí
Tó einaferð man deyðin greiða fløkjuna
Finnur okkum øll fyrr ella seinni

Nú var tín túrur umsíður komin
Farin um sýnuna burtur úr mannaeygum
Handan deyða og grøv stendur Frelsarin
Býður tær vælkomnan heim í sæluna
Frá ungum av vart tú á ferð
Á tí smala vegnum ávegis móti Paradís
Gævi vit síggjast aftur har heima
Takk fyri alt tú vart fyri okkum.

Rituvík EKN

Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu mær 50 ára føðingardagin so ógloymandi, takki eg hjartaliga.

Vinarliga
Jóannes Eidesgaard

Síggj Europa við Atlantic Airways!

Genéve
Prísir úr 3.815,-

Madrid
Prísir úr 3.975,-

Nice
Prísir úr 3.625,-

Sí annars øll okkara góðu tilboð í blaðnum "Út í heim"

Ferðirnar kunnu bíleggjast á øllum ferðaskrivstovum kring landið.

Íroknað prísin er flogferð fram/aftur Føroyar - Keypmannahavn við Atlantic Airways og viðari við SAS. Møguleg gising í samband við ferðina og ferðaavgjøld eru ikki íroknað. APEX treytir eru galdandi og møguleiki er fyri at støðga í Keypmannahavn í mesta lagi 2 dagar.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 10 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

gult3 cyan3 magenta3 svart3

Nýtt kappróðrarneyst á Glyvrum

Kappróðrarfelagið NSÍ fer um stutta tíð at taka nýtt og væl útgjørt kappróðrarneyst í nýtslu

KAPPRÓÐUR
Edvard Joensen

Glyvrar: Kappróðrarfelagið NSÍ byggir eitt nýtt neyst til bátar sínar. Neystið stendur inni á Bakka á Glyvrum, og verður ætlandi klárt liðugt einaferð í mai.

Talan er fyrst og fremst um felagshús hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, sigur formaður felagsins, Sofus Hansen.

Hann greiðir frá, at farið varð undir at byggja neystið í 1998. Í 1999 varð tað innilokað, og nú í summar verður tað so tikið í brúk.

Neystið kostar 1,7 milliónir krónur, tá tað er liðugt. Men fólkið aftan fyri kappróðrarfelagið hevur verið dúglit at savna pening til byggingina, soleiðis at nú neystið er liðugt, stendur tað bert í umleið 200.000,- 300.000,- krónum, sigur formaðurin. Restin er longu goldin.

Í neystinum er pláss fyri fýra bátum í neðra. Tó eru fimm inni í løtuni, sigur Sofus Hansen, formaður. Umframt eru tvey brúsurúm og wc, eins og ein gongd er, haðani trappa gongur upp til ovaru hæddina.

Í ovaru hæddini er ein stór høll upp á 120 fermetrar. Opin upp í tróðrið. Har verður væntandi pláss hjá hálvtannaðhundrað fólkum at sita, heldur formaðurin í Kappróðrarfelagnum NSÍ. Umframt er eisini nýmótans køkur, eins og trý wc eru í teirri hæddini. So umstøðurnar verða rættiliga góðar til felagslív í neystinum, sigur Sofus Hansen.

Væntandi verður neystið leigað út til veitslur av ymsum slagi, um áhugi er fyri tí. Men tað fer sjálvandi fyrst og fremst at verða brúkt til felagsarbeiðið hjá kappróðrarfelagnum, sigur formaðurin.

Áðrenn nýggja neystið varð bygt, húsaðist felagið í einum gomlum grótneysti, har seinastu tíðina ikki var so frægt sum hurð fyri. So tað kann ikki samanberast við tað, sum nú er.

Sofus Hansen, formaður í Kappróðrarfelagnum NSÍ vónar, at tað fer at bera til at manna seks bátar aftur í ár, eins og í fjør.

Men fyribils er støðan tann, at áttamannaførini eru ikki mannað. Báðir teir smærru bátarnir, Tjaldrið og Spógvin eru mannaðir. Seksmannafarið Sólmundur er mannaður, og tað sama er tíggjumannafarið Eysturoyingur.

Kappróðrarfelagið NSÍ hevur bygt nýtt kappróðrarneyst á Glyvrum

Mynd: Edvard Joensen

Sólmundur er nýggjur bátur. Tann gamli Sólmundur er seldur av landinum, eins og gjørt plagar at verða við stórru førini, tá skiftast skal út. Í fjør vann dreingjamanningin á Tjaldrinum eina ferð til kappróður í Sorø í Danmark. Teir høvdu Sólmund við sær, og í Danmark hildu fólk so mikið nógv av bátinum, at tey keyptu hann.

Men Kappróðrarfelagið NSÍ hevur eisini tvey áttamannafør, sum enn standa á lunni. Kappróðrarfelagið NSÍ keypti her fyri Skopuningin og nevndi hann Heiðabátin. Eisini hevur felagið lænt Toftabátin, sum hevur skift lit og nú er gulur.

Hóast felagið eitur Kappróðrarfelagið NSÍ, er talan um sjálvstøðugt felag, sum einki hevur við ítróttarfelagið NSÍ at gera. Og tað hevur eingin trupulleiki verið av navninum, hóast nøvndini á felagunum báðum líkjast heilt nógv, sigur Sofus Hansen, formaður í kappróðrarfelagnum NSÍ.

Føroya Fiskavirking nútímansger

Ein størri nútímansger er farin í gongd á Føroya Fiskavirking í Runavík. Byrjað verður við móttøkuhøll

FISKIVINNA
Edvard Joensen

Farið er undir at gera eina nýggja móttøkuhøll á Føroya Fiskavirking í Runavík. Byggingin er liður í eini størri ætlan um at nútímansgera virkið.

Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, sigur, at hetta arbeiði, sum farið er undir í Runvík, umfatar bygging av eini móttøkuhøl upp á einar 600 fermetrar. Kostnaðurin fyri hetta byggistigið fer at liggja um einar tríggjar-fýra milliónir krónur, metir hann.

Umframt at sjálv høllin verður bygd, skal eisini gólv gerast, frárensl og tíllíkt skulu takast upp og gerast av nýggjum, umframt at nýggj køliútgerð skal setast upp.

Hvat hvør parturin nágreiniliga fer at kosta, er ilt at siga, sigur Meinhard Jacobsen.

Stjórin á Føroya Fiskavirking sigur, at tað verður alla tíðina arbeitt við at halda virkini hjá felagnum á so høgums øði, sum gjørligt. Hendan móttøkuhøllin, sum nú verður bygd í Runavík, er bæði lógarkravd og ikki, sigur hann. Soleiðis at skilja, at okkurt av arbeiðinum, gjørt verður, er slíkt, sum kravt er, meðan annað er slíkt, sum Føroya Fiskavirking av sínum eintingum ger fyri alla tíðina at vera upp á forkant, um nakað skuldi stungist upp.

Í langtíðarætlanini, sum løgd er fyri útbyggingini á Føroya Fiskavirking í Runavík, eru eisini stórar umvælingar inni á sjálvum virkinum.

Meinhard Jacobsen, stjóri, vil ikki nevna nakað serstakt, sum gerast skal, men letur tó skilja, at okkurt kanska verður við nýggjum linjum og onkrum sovorðnum í framtíðini

– Talan er um stórar ætlanir, sum strekkja seg yvir langt tíðarskeið. Tað kann nógv henda, so hvørt vit koma fram, so ikki ber til at læsa seg púra fastan í nakra serloysn soleiðis beinanveg, sigur Meinhard Jacobsen.

Men hann sigur tó, tann ætlaða nútímansgerðin á virkinum fer at kosta nógv. Nógvar milliónir, sigur hann.

Meinhard Jacobsen varar, sum stjóri á Føroya Fiskavirking, av fleiri flakavirkjum í landinum.

Tað eru alla tíðina ætlani frammi um viðlíkahald og moderniseringar á øllum virkjunum, sigur hann, Tað ræður um at fylgja við tíðini. Men samstundis skal eisini hyggjast til pengapungin.

Hóast hann letur at, at hóast tað hevur gingið hampiligt seinnu tíðina, eru ongar ítøkiligar stórætlanir á øðrum fiskavirkjum hjá Føroya Fiskavirking í løtuni, sigur hann.

Fundamentið til móttøkuhøllina á Føroya Fiskavirking í Runavík verður nú stoypt

Mynd: Edvard Joensen